

# Tørvur á 39.000 fólkum til oljuvinnuna í Bretlandi

Deil:



**Jan Müller**

06.07.2014 - 12:44

Oljan.fo

Vit skrivaðu í gjár, at BP tørvar 100 fólk at arbeiða á Sullom Voe oljuterminalinum, aftrat teimum umleið 2500, sum longu arbeiða har í sambandi við bygging av eini stórari gassverksmiðju. Nú vísir ein frágreiðing frá Bank of Scotland, at olju- og gassvinnan í Norðsjónum tørvar 39.000 fólk næstu tvey árini.

Bankin hevur spurt vinnuna, hvussu er stætt við arbeiðsfólki og vísir kanningin, at 69% av fyritøkunum eru bjartskygdar, tá talan er um at útvega nýggj størv í 2014. 38% av teimum spurdu svara, at tað verður ein stór avbjóðing at fáa fólk við neyðugu útbúgvingunum.

Forstjórin í Bank of Scotland, Stuart White, sigur í eini viðmerking til kanningina, at hon ger greitt teir stóru møguleikarnar, sum framhaldandi liggja í olju- og gassvinnuni. Herfyri vóru tøl annars frammi, sum vístu ta øvugtu gongdina, nevniliga, at framleiðslan fór at minka og at minni áhugi var fyri at gera íløgur í hesa vinnuna.

Mett verður nú at menningin í oljuvinnuni fer serstakliga at vera í Aberdeen og har nærhendis. Men alt Bretland fer at fáa lut í menningini sigur bankastjórin, sum eisini vísir á, at nettupp olju- og gassvinnan verður ein týðandi partur av kjakinum kring fólkaatkvøðuna 18. september um loysing frá Bretlandi.